somikið væl hesi árini, at tey fingið ráð til at keypa sær hús, handil og bát á Tvøroyri, tá tey fluttu heim aftur.

– Vit høvdu ongantíð sæð so nógvan pening áður. Tað var heilt fantastiskt. Men ymiskt var, hvussu hann var nýttur. Vit ungu brúktu hann beinanvegin, meðan tey eldru spardu upp og sendu heim til Føroyar, greiða tær frá. Og Pipan minnist, tá hon kom yvir á fyrsta sinni í 1964. Tá høvdu hinar longu verið har í nøkur ár.

– Jónhild ráddi meg yvir, og eg minnist enn, tá hon kom eftir mær á keiini. Í síðum frakka við pelskraga og øllum, sigur Pipan, og allar flenna, tí soleiðis høvdu tær ikki torað at gingið á Tvøroyri tá. Sostatt var her talan um heilt aðrar peningaligar umstøður enn tær vóru vanar við í Føroyum, og eitt hitt fyrsta Meivør keypti sær var konfirmatiónsfrakkan.

## Látur og grátur á Grundini

Tær 15 føroysku kvinnurnar í teirra sjakki arbeiddu fyri reiðaríið H/F Miðnes, sum átti bæði skip og virki. Tær fegnast allar um góðu umstøðurnar, tær fingu frá reiðarínum. Frítt hús, flutning og sjúkratrygging.

– Vit arbeiddu og búðu í Sandgerði, ið liggur skamt frá Bláa Lóninum, sum flest øll, ið hava ferðast í Íslandi, helst kenna. Húsini vórðu rópt Grundin, og har búðu vit allar samlar. Mammur, mostrar, systrar og døtur. Arbeiðið innandura var býtt hegnisliga millum okkum. Tær eldru gjørdu mat, og vit ungu vaskaðu, greiðir Jónhild frá. Og hinar skoyta uppí, at hóast aldursmunin, eindust tær sera væl.

– So har var sjálvandi eitt lív av aðrari verð, bæði við látri og gráti, siga tær flennandi og minnast aftur á dansin í Samkomuhúsinum og í Krossinum.

– Hetta var fyrstu ferð eg sá konufólk berjast. Tær íslendsku vóru meira framligar og drukku meira, minnist Pipan. Enn einaferð tekur onkur teirra til niðurlagið Jau-jau, tá stuttur steðgur er í lívliga prátinum, og eyguni líta út í rúmið, meðan minnini ferðast aftur til hesi besti árini í lívinum. Og tær greiða frá kvøldunum, tá tær allar sótu uppi og sungu fleirræddaðir nostalgiskar sangir, meðan tær grótu um heimlandið og fjaðursára fuglin í búri.



*Ungdómar úr øllum Føroyum hugna sær á Grundini í Sandgerði. Nógv teirra eru bæði ommur og abbar í dag. – Fýra koyggjur vóru á hvørjum kamari, sum vit hugnaðu um við teppum, hillum og plátuspælara*



*Tríggjar lekrar í fiski. Meivør, Jónhild og Michela (systir Meivør) við svintu og kovboyhatti. – Vit vóru altíð snollaðar upp. Eisini tá vit arbeiddu. Í hatti og sminkaðar, við touperaðum hárið og valki. Ella vit rullaðu tað upp og bundu turriklæði um.*



*Handan íslendska mannin stendur Poula av Tvøroyri. Pipan við kamera og brillum og Jónhild í vatteraðum jakka*

## Vesipappír um lokkarnar

Uttan fyri stóðu íslendsku sjeikarnir og floytaðu eftir uppsnollaðu føroysku gentunum. Og onkuntíð eydnaðist tað teimum at fáa tær við ein biltúr og í biograf.

– So drukku vit sodavatn og hugnaðu okkum, sigur Jónhild, og tær eru samdar um, at tær ongantíð vóru fyri nøkrum keðiligum hendingum, tí tær fylgdust altíð nógvar saman. Tær minnast, hvussu standurin var, tá lønin kom og sesongin var liðug.

– Eins og í dag, vóru íslendingarnir meira amerikaniseraðir, og vit vóru nakað so smartar, tá vit komu heim til Tvøroyrar aftur. Tá lønin kom, fóru vit beint til Reykjavíkar við øllum pengunum og keyptu okkum alt millum himmal og jørð. Klæði, sminkur og fóru til frisør.

– Einaferð minnist eg, at eg hevði verið hjá frisør, sum hevði sett hárið so flott upp. Tá bant eg vesipappír um lokkarnar, so teir skuldu halda sær allan vegin til Føroyar við bátinum, sigur Meivør og flennir.

## Fremmand arbeiðsmegi

Allar minnast serliga væl, at tað altíð arbeiddu nógvir útlendingar saman við teimum.

– Tá vóru vit føroyingar fremmandaarbeiðarar, og har kundu vera 13 ymsar tjóðir umboðaðar á einum stað. Líka úr Mexiko og Cuba til Føroyar, og øll fingu vit líka løn og somu sømdir sum vanligi íslendski arbeiðarin. Hetta hugsi eg ofta um, tá eg hoyri um, at føroyskir arbeiðsgevarar undirbetala fremmandari arbeiðsmegi. Tað líkist svartasta ongum, sigur Meivør hvassliga, og hinar nikka samtykkjandi og senda ein takksaman tanka til grannarnar fyri norðan.

Sum vaksnar hava tær tríggjar heldur ikki verið bangnar fyri at taka fatt, bæði úti sum heima. Pipan, sum í dag er 63 ár, hevur arbeitt á posthúsinum á Tvøroyri í mong ár. 64 ára gamla Jónhild hevur tikið sín kjans á sjúkrahúsinum, har hon starvast enn í dag, meðan 60 ára gamla Meivør í mong ár hevur staðið í handlinum, sum pápin lat keypa fyri vinningin úr Íslandi.

*Gomlu myndirnar eru privat ogn*

Sosialurin